NSÍ-HB:

Jógvan Martin biður farvæl

Og Kaj Leo Johannesen verður ivaleyst á HB beinkinum, tá ið meistararnir fara til Runavíkar eftir gullinum og meistaraskapinum, og Rógvi Jacobsen fer at siga HB farvæl

UPPTAKT
Jóannes Hansen

Sjálvandi verður tað ikki sørt av HB viðhaldsfólkum í Runavík seinnapartin í dag, tá ið meistararnir fara at avheinta sjónligu merkini uppá, at teir í 2004 eiga besta fótboltsliðið í landinum. Men um tað skal metast út frá uppmøtingini, sum var, tá ið HB síðsta sunnudag spældi fyri síðstu ferð á heimavølli í ár, so tykist brúsið vera farið úr. Men so skal havast í huga, at veðrið var vánaligt, tá ið HB og GÍ spældu.

Bárður Johannsen verður ikki millum teir ellivu, sum kanska fara at hava gull í hárinum og á skónum. Hann er leikbannaður eftir býttisligu útvísingina móti GÍ. Tað var hann eisini, tá ið HB fyri tveimum árum síðani fekk gullið handað á Sevmýri. Tá hevði hann í næstsíðsta umfarinum, tá ið HB spældi móti EB/Streymi, eisini fingið reytt kort orsaka av hevnisøku!

Poul Næs Joensen verður í HB málinum í dag. Hann var settur á dómaraseðilin fyri einari viku síðani, men tá var hann ikki førur fyri at fara í málið at standa, eftir at Bárður Johannesen var útvístur, tí hann hevði beklað og fekk ikki runnið. Hin málverjin, Danny Rasmussen, fer at spæla við í 3. deild í Runavík í dag. Gamli HB málverjin og núverandi formaðurin í Sambandsflokkinum, 40 ára gamli Kaj Leo Johannesen, hevur verið til venjingar í hesi vikuni. Hann hevur í summar spælt við 4. deildarliðnum, sum síðsta leygardag vann gull, so hann verður mettur at vera nóg væl fyri at sita á beinkinum.

Allir hinir HB spælararnir eru tøkir. Talan er um síðsta HB dystin í hesum umfarinum hjá Rógva Jacobsen, sum nú fer til Íslands. Rógvi hevur verið ovastur á máltindinum tað mesta av árinum, men móti NSÍ skal hann gera ein orduligan vørr, um hann skal taka Sonna L. Petersen.

Í HB vilja teir fegnir runda av við maner. Men so skal hugburðurin vera tann rætti allar 90 minuttirnar. Tað hevur kanska knípt við hesum tvær tær seinastu ferðirnar.

Jógvan Martin biður farvæl

Trý tey seinastu árini hevur Jógvan Martin Olsen verið venjari í Runavík. Teir í NSÍ og venjarin hava verið væl nøgdir við samstarvið. Í 2002 rakk NSÍ fyri fyrstu ferð silvurkrónunum og harvið luttøku í Europa Cup, og í fjør endaðu teir á fjórða plássinum. Í ár hevur tað verið meiri striltið, men endastøðan kann gerast omanfyri miðstrikuna, um tað eydnast at geva venjaranum trý stig í farvæl dystinum.

Jógvan Martin Olsen fer nú í fulltíðar starv hjá Fótbóltssambandinum, og hann sigur seg ikki rokna við, at hann útilokar harvið, at hann fer at hava ábyrgdina av nøkrum 1. deildarfelagið næsta ár.

16 ára gamli Jóhan Troest Davidsen, sum móti Skála var sannførandi í NSÍ miðverjuni, og sum í fyrradagin skrivaði undir trý ára sáttmála við Everton, verður í miðverjuni, um tað ikki fer at forða honum í Everton ætlanunum. Men hann fer undir øllum umstøðum at siga farvæl við barndómsfelagið í dag.

Ike, Alexander Jovevic og Áki Leitistein Hansen eru leikbannaðir, og Dánial Hansen er framvegis skaddur. Kári Hansen er við aftur, eftir at hann var leikbannaður móti Skála.

B36-B68:

B36 fær silvur og B68 biður farvæl

Á sama vøllinum, har teir í fjør mistu møguleikan at vinna meistaraskapin, fer B68 eftir 24 ár í bestu deildini at takka fyri seg

UPPTAKT
Jóannes Hansen

Í triði síðsta umfarinum í fjør var B68 í Gundadali. Tá stóð nógv upp á spæl. Teir stríddust við HB, og tað var møguleikin fyri at vinna meistaraskapin, sum teir arbeiddu fyri. Ta ferðina var B68 við undirlutan.

Í dag er B68 aftur í høvuðsstaðnum. Nú stendur bara æran upp á spæl. Mánakvøldið varð tað greitt, at B68 næsta kappingarár skal spæla í 2. deild. Teir hava ongan møguleika at røkka næstaftasta plássinum.

Tað er greitt, at Anderson, sum seinastu ferðirnar hevur skorað hvørja ferð, ikki verður í B68 álopinum. Eftir reyða kortið móti EB/Streymi er hann leikbannaður. Jákup Eli Olsen var leikbannaður mánakvøldið. Hann er tøkur aftur.

Hvussu tað verður við fólki næsta ár, og um Trygvi Mortensen fer at halda fram sum B68 venjari ella ikki er einki likið út um enn. Tað eru bara fýra dagar síðani, at fyrsta niðurflytingin hjá B68 úr bestu deildini gjørdist veruleiki.

Silvur omaná silvur

Í fjør vann B36 silvur, og í dag fara teir at fáa eitt nýtt sett av silvurmerkjum. Tað er greitt, at John Petersen ikki verður við í dag. Hann fer av landinum seinni í hesum mánaðinum, og um hann skal hava møguleika at royna fótbóltsevnini á flatlondum nú í heyst, so er tað sambært ásetingunum ikki loyvt honum at spæla við í síðsta umfarinum í føroysku kappingini.

Tað hevur ljóðað, at fleiri av B36 spælarunum hava hugsað um at gevast, og enn hevur einki verið at frætt um, um Jóannes Jakobsen fer at halda fram sum venjari ella ikki. Spælararnir, sum tað hevur ljóðað hava umhugsað at seta skógvarnar á hillina, eru innkarneraði B36 maðurin Jens Kristian Hansen, Jens Erik Rasmussen, sum hevur spælt millum lítið og einki í ár, Jóhannis Joensen, Egil á Bø og Allan Mørkøre. Ivaleyst fer onkur av hesum at gevast, men tað er einki at ivast í, at onkur teirra aftur fer at verða at síggja næsta ár.

Aftur í ár fer Tórshavnar Býráð at skipa fyri móttøku fyri HB

Móttøka fyri HB

Býráðið í Havn skipar fyri móttøka í gamla kommunuskúlagarði num leygarkvøldið klokkan 20

MEISTARAR
Tíðindaskriv

Tað verða óivað nógv viðhaldsfólk hjá HB, sum leygardagin fara inn til Runavíkar, har NSÍ og HB hittast á vøllinum við Løkin í seinasta leikumfarinum í ár. Sjálvt um HB longu er føroyameistari í 1. deild hjá monnum, er lagt upp til ein spennandi dyst.

Í fyrra landskappingardystinum í ár í Gundadali vann HB tepurt 1-0. Liðini spældu seg eisini í finaluni um løgmanssteypið, sum var á Tórsvølli ólavsøkudag. Tann dysturin endaði, sum vit minnast 3-1 til HB.

Eftir at føroyameistararnir í 1. deild 2004 eru komnir aftur til Havnar um átta tíðina leygarkvøldið, verður skipað fyri móttøku í gamla kommunuskúlagarðinum, har býráðsformaðurin, Jan Christiansen, fer at flyta fram røðu. Formaðurin í HB, Birgir Enghamar, ætlar sær somuleiðis at siga nøkur orð. Men ikki nokk við tí. Fyrr í ár vann HB Atlantic Cup 2004 ímóti íslendsku meistarunum KR við trimum málum móti einum. Umboð fyri Fótbóltssambandið fara á móttøkuni leygarkvøldið at handa steyp og gullheiðursmerkir til HB liðið fyri hetta bragd.

Fyri at seta ein hátíðarligan dám á móttøkuna, hevur Havnar Hornorkestur, sum ikki einaferð, játtað at spæla.

Dystir um vikuskiftið

1. deild menn
Kl. 16.00 . . .B36-B68
Oddmar Andreasen
Kl. 16.00 .EB/S-Skála
Lassin Isaksen
Kl. 16.00 . . . . . .KÍ-ÍF
Dagfinn Olsen
Kl. 16.00 . . . . .GÍ-VB
Eiler Rasmussen
Kl. 16.00 . . . .NSÍ-HB
Birgir Sondum

2. deild menn
Kl. 14.00 . . .B36-B71
Jens P. Brattalið
Kl. 14.00 . . . . .TB-VB
Rúni Gaardbo
Kl. 14.00 Sumba-Royn
Páll Augustinussen
Kl. 14.00 . . . .FSV-AB
Petur Skarðenni
Kl. 14.00 . . . . .KÍ-LÍF
Hans F. Hansen

3. deild menn
Kl. 12.00 . . .Fram-B68
Ransin N. Djurhuus
Kl. 12.00 .EB/S-Skála
Petur Reinert
Kl. 12.00 . . . . . .SÍ-ÍF
Jóannes Mikkelsen
Kl. 12.00 . . . . .GÍ-TB
Eugen Voda
Kl. 12.00 . . . .NSÍ-HB
Georg N. Rasmussen

KÍ-ÍF:

ÍF er í døpurhuga

Í Klaksvík eru tveir leikbannaðir, meðan fuglfirðingar ivast í, um tað loysir seg at seta teir tríggjar á vøllin í dag, sum undan endaumfarinum liggja á markinum at verða leikbannaðir

UPPTAKT
Jóannes Hansen

Í nakrar vikur var møguleiki fyri, at tað í 100. árinum hjá KÍ kortini skuldi eydnast teimum at vinna heiðursmerkir. Tapið í Vági bar við sær, at einki fer at spyrjast burturúr hesum. Undan síðsta umfarinum er KÍ á 6. plássinum. Um væl vil til í dag, so er møguleiki fyri, at KÍ fer at enda á fjórða plássinum. Um illa fer at vilja til hjá klaksvíkingum í dag, so verður endastøðan sjeynda plássið.

Jákup Mikkelsen hevur vant eitt lítið sindur í vikuni, men í gjár var tað rættuliga ivasamt, um hann verður førur fyri at spæla í dag, tá ið hann fyri síðstu ferð verður í KÍ búnanum.

Tað er greitt, at Eyðun Klakstein og Leon Bjartalið verða leikbannaðir, eftir at teir sóu gult í Vági. Ovi Nysted er tøkur aftur, eftir at hann var leikbannaður síðsta sunnudag. Møguligir avloysarar eru Frank Joensen ella Tórður Lervig. Teir hava síðstu ferðirnar spælt onkra løtuna. Kristian á Lakjuni var eisini við í Vági, men hann hevur spælt so mikið lítið, at hann neyvan verður við frá fyrsta bríksli.

Goyma trumfarnar

Mánakvøldið varð tað greitt, at ÍF skal í endaspæl um plássið í bestu deildini. Tað skulu teir uttan mun til, hvussu tað fer at vignast í Klakksvík í dag.

Allir fuglfirðingarnir eru tøkir. Spurningurin er tó, um allir teir, sum plaga at vera á besta liðnum, fara at vera har í dag. Støðan er tann, at tríggir spælarar verða leikbannaðir næstu ferð, teir fara at síggja gult. Um teir fara at síggja gult í dag, so verða teir leikbannaðir í fyrra dystinum í endaspælinum. Talan er um Bartal Eliasen, Rúna Elttør og Fritleif í Lambanum, sum eisini er eitt sindur smáskaddur.

Tá ið ÍF í síðsta umfarinum í 1999 var í Klaksvík, fluttu teir niður í næstbestu deildina, meðan KÍ gjørdist meistari. Tað er greitt, at hvørki ÍF ella KÍ fara at endurtaka ávikavíst sorgarleikin og bragdið í dag.

Nýggj verja í Gøtu

Við fullari úrtøku hava bæði gøtumenn og vágbingar møguleika at leypa upp um trý onnur á støðutalvuni

GÍ-VB
Jóannes Hansen

Tá ið gøtumenn fyrr í summar vóru í Vági fóru teir norður um aftur til 4-2 sigri. Tað var kanska eitt sindur óvæntað. Nú hava vágbingar møguleikan at vinna hetta innaftur. Um tað eydnast teimum at gera tað, so verður tað eisini eitt sindur óvæntað. Burtursæð frá sigrinum á KÍ í illveðursdystinum á Eiðinum, so hevur tað verið tunnligt hjá VB seinastu tíðina.

Vágbingar eru triði aftastir, og gøtumenn eru fjóði aftastir. Um annar parturin fer at fáa fult í dag, so er møguleiki fyri, at tað liðið kann leypa upp um í mesta lagið trý av teimum, sum eru omanfyri stødd.

Hjá GÍ er fyrrverandi VB venjarin og núverandi GÍ venjarin og álopsspælarin, Krzystof Popczynski, tøkur aftur, eftir at hann var leikbannaður móti HB. Poul Henning Jacobsen var eisini leikbannaður síðsta sunnudag, og hann er eisini tøkur hesa ferð.

Tveir gøtumenn eru leikbannaðir í dag. Teir eru verjuspælararnir Poul Ennigarð, sum eisini er liðformaður, og Atli Gregersen. Undan síðsta vikuskifti varð sagt, at Atli Gregersen var leikbannaður. Tað var hann ikki, tí eitt av kortunum (tað sum hann fekk í Klaksvík) var ikki skrásett. Tí spældi Atli síðsta sunnudag. Tá ognaði hann sær eitt gult kort afturat, og tí er hann leikbannaður móti VB.

Vongverjin Hanus Jacobsen er burturstaddur við skúlaflokkinum. Tað ber við sær, at gøtumenn verða noyddir at skipa verjuna heilt av nýggjum. Kaj Ennigarð, sum er lutfalsliga nýggjur á besta liðnum, verður veteranur í dag.

Tað er greitt, at Popczynski aftur næsta ár verður venjari hjá GÍ.

Mindaugas burtur

Hjá VB er tað greitt, at dysturin í dag verður tann seinasti hjá Hans Nielsen í venjarasessinum. Hann hevur fyri fleiri vikum síðani boðað frá, at hann ikki verður venjari næsta ár.

Tað er eisini greitt, at Mindaugs ikki verður í VB álopinum í dag. Hann tiltuskaði sær reytt kort móti KÍ og harvið leikbann móti GÍ.

Allir hinir spælararnir eru tøkir í dag. Tað hevur verið nevnt, at superveteranurin Eyðun Jacobsen møguliga fór at gevast, men tað vilja teir í Vági ikki skriva undir uppá, at hann fer at gera. Bjarni Johansen hevur vart VB málið í meiri enn seytjan ár, og tað fer hann eisini at gera næsta kappingarár.

Kappsúkkling fyri børn

Leygardagin verða seinastu FM-kappingarnar hjá Tórshavnar Súkklufelag í ár.

SÚKKLING
Tíðindaskriv

Kappast verður í einkultstarti fyri børn. Kappingin er verður hildin á vegnum Kaldbaksmegin inni í Kaldbaksbotni, súkklast skal úr Kaldbaksbotin móti Kaldbak og aftur. Børnini kappast í trimum aldursbólkum fyri gentur og dreingir, bólkarnir eru:

Bólk. I: 1996 til 1998
Bólk. II: 1993 til 1995
Bólk. III: 1990 til 1992

Øll eru vælkomin at takað lut. Treytin er at súkklan er í rímuligum standi og at góður hjálmur verður brúktur. Tilmelding er inni í Kaldbaksbotni frá kl. 14:30. Sjá eisini heimasíðuna www.tsf.fo

Dómarar og hjálparfólk eru teir vaksnu kappsúkklararnir hjá Felagnum.

Arsenal-spælarar bardust í Noregi

Tveir ónavngivnir spælarar hjá enska felagnum Arsenal brustu saman í spælarabussinum eftir javnleikin ímóti norska felagnum Rosenborg mikukvøldið. Arsenal og Rosenborg spældu í Tróndheimi, og tað var vónbrot fyri Arsenal, at Champions League dysturin endaði 1-1.

Og sambært norska blaðnum VG vóru tveir av spælarunum hjá Arsenal so illir um úrslitið, at teir fóru at berjast í bussinum eftir dystin. Norskir løgreglumenn og liðfelagar noyddust at leggja upp í fyri at steðga bardaganum, og sambært eygnavitnum var talan um eitt álvarsamt slagsmál.

Arsenal hevur ikki gjørt viðmerkingar til tíðindini.

ek

Skateboard-kapping

Um viðrar, skipar Margarinfabrikkin fyri stórari Skateboard kapping á Frælsinum, leygardagin 2. okt. kl 14. Tekning fer framm á staðnum ein tíma undan kappingina, kostnaðr er 20 kr.

Kappast verður í tveimum bólkum. 7 - 12 ár og 13 - 16 ár. Góðir vinningar verða latnir stendur í tíðindaskrivi frá Margarinfabrikkini

Ein dyst frá endaumfarinum

Pætur Jørgensen og Ólavur í Ólavsstovu, sum í løtuni ganga á ítróttarskúla í Oure, eru nú bert ein dyst frá at koma fram til endaumfarið í stóru donsku kappingini í skúlafótbólti.

Hósdagin spældi Oure hálvfinalu í Eysturfjónøkinum. Hendan var ímóti einum liði, sum kallast Hjalleskolen. Oure vann dystin 7-2 og skeyt Ólavur annað av málunum. Finalan verður ímóti Giersings Realskole.

-jm

Benny skal venja Fremad

Fremad Amager hevur sett nýggjan venjara, eftir at Michael Guarini herfyri varð settur frá. Og tað verður eitt av stóru donsku venjaranøvnunum, sum nú skal venja føroysku leikararnar í felagnum. Talan er nevnliga um Benny Johansen, sum annars var upp á tal sum føroyskur landsliðsvenjari í síni tíð. Tað gjørdist sum kunnugt Henrik Larsen, sum fekk tann sessin, og ístaðin gjørdist Benny so venjari hjá Ølstykke, sum Henrik Larsen áður vandi. Her varð Benny so koyrdur úr starvoinum fyri stuttum, og nú verður tað so Fremad Amager, sum verður næsta arbeiðspláss hansara.

-jm

Taptu 4-0

Føroyska kvinnulandsliðið leikti hóskvøldið ímóti Belgia í mini-kappingini, sum liðið tekur lut í í Pólandi.

Úrslitið av dystinum hesaferð gjørdist eitt 4-0 tap. Føroyska liðið hevur ein dyst eftir, og er hesin ímóti Ukraina.

-jm

Bragdið fer undir ungdómsvenjing

Sum nakað nýtt fer Bragdið nú undir ungdómsvenjing innan frælsan ítrótt. Aldursbólkarnir, sum hetta fevnir um, eru 3. til 7. flokkur, og verður talan ætlandi um spennandi og fjøltáttaðar venjingar.

Byrjað verður komandi týsdag á Niðara vølli í Gundadali kl. 16.00. Fyrireikararnir vóna sjálvsagt, at veðrið er til vildar, men luttakararnir verða tó biðin um at hava venjingarklæði, sum hóska seg til uttandura venjingar.

-jm

Stigatalvur

1. deild menn

		d	v	-	j	-	t	mál	v mál	t +/-	stig
1	HB	17	12	-	4	-	1	45	16	29	40
2	B36	17	9	-	4	-	4	31	19	12	31
3	Skála	17	8	-	3	-	6	31	23	8	27
4	EB/S	17	7	-	4	-	6	30	24	6	25
5	NSÍ	17	7	-	3	-	7	26	23	3	24
6	KÍ	17	5	-	8	-	4	22	22	0	23
7	GÍ	17	6	-	5	-	6	29	31	-2	23
8	VB	17	6	-	4	-	7	23	22	1	22
9	ÍF	17	3	-	3	-	11	23	48	-25	12
10	B68	17	2	-	2	-	13	17	49	-32	8

2. deild menn

		d	v	-	j	-	t	mál	v mál	t +/-	stig
1	TB	17	11	-	2	-	4	45	23	22	35
2	B71	17	11	-	2	-	4	47	30	17	35
3	AB	17	10	-	2	-	5	30	23	7	32
4	LÍF	17	8	-	4	-	5	30	28	2	28
5	FSV	17	8	-	3	-	6	54	36	18	27
6	Royn	17	8	-	1	-	8	38	39	-1	25
7	Sumba	17	6	-	4	-	7	24	30	-6	22
8	B36	17	5	-	3	-	9	27	45	-18	18
9	KÍ	17	3	-	3	-	11	26	39	-13	12
10	VB	17	1	-	4	-	12	18	46	-28	7